# Býráðið í spanderibuksunum

**Tórshavnar Býráð játtaði og markaði hóskvøldið ikki færri enn 138 milliónir til íløgur. Størstu postarnir eru ellisheim fyri 28 milliónir og Ytri Ringvegur fer við 21 milliónum**

ÍLØGUR
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Býráðsfundurin hóskvøldið var drúgvur, og bunkin av málum var stórur. Tá býráðslimirnir fóru til hús, høvdu tey játtað og markað ikki færri enn 138 milliónir krónur. Pengarnir fara tó ikki av kassanum beint her og nú, men talan er um íløgur, ið fevna um 2-3 ára ætlanir.

Umframt tær 138 milliónirnar, sum nú eru játtaðar og markaðar, liggja 93 milliónir av játtaðum íløgum, sum undanfarna býráð ikki framdi í verki.



*Heðin Mortensen og starvsfelagarnir í Tórshavnar Kommunu samtyktu hóskvøldið íløgur fyri tilsamans 138 milliónir krónur*

### Tey stóru málini

Størsti posturin hetta kvøldið var uppskotið um eitt nýtt røktarheim við Hoyvíkstjørn. Býráðið góðkendi hóskvøldið kostnaðarmetingina áljóðandi góðar 28 milliónir krónur, og arbeiðið verður boðið út í næstum. Røktarheimið fer at hava 24 búðpláss.

Umframt hesa ítøkiligu ætlanina hevur býráðið eisini keypt eitt øki á 18.000 fermetrar við Boðanes úti við Strond. Økið liggur beint niðanfyri Lágargarð, og økið er avsett til útbygginar á eldraøkinum.

- Bráfeingis-tørvurin er stórur, og vit kunnu ikki sita hendur í favn. Hetta er eitt landsmál, men einki hendir, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hóast eldraøkið framvegis er eitt økið hjá landsstýrinum, er býráðið farið í gongd við stórar útbyggingar á økinum. Eldrasambýlið í Vallalíð letur skjótt upp, og tað fer at betra munandi um støðuna. Tað er tó framvegis landið, sum rindar raksturin fyri heimini.

Umframt at byggja nýtt hevur býráðið samtykt pening at gera eina kanning av tørvinum á eldraøkinum. Hendan kanningin skal vera grundarlag undir komandi útbyggingum á eldraøkinum.

### Ytri Ringvegur

Vegakervið í høvuðsstaðnum verður eisin útbygt í næstum. 21 milliónir eru samtyktar til Ytra Ringveg, sum fer at binda teir ovaru býarpartarnar í hoyvíkshaganum saman.

Landsverk fer at gera ein part av arbeiðnum, men kommunan er longu farin í gongd. Harumframt verður eisini farið í gongd við Glyvursveg, sum skal betra um ferðsluviðurskiftini hjá argjafólki. Nýggjur vegur skal gerast frá Hamaranum á Argjum og bindast í ringvegin omanfyri kirkjugarðin. Arbeiðið er mett at kosta 8 milliónir.

### Stórar útbyggingar á ítróttarøkinum

Býráðið hevur eisini gjørt eina langtíðar fíggjarætlan, og her verður ítróttar- og frítíðarøkið raðfest høgt.

Fyri árið 2005 eru avsettar 2,6 milliónir, í 2006 eru avsettar 8 milliónir, og í 2007 og 2008 ætlar býráðið at nýta 16 milliónir hvørt árið.

Hesir pengarnir fara fyrst og fremst til rennibreyt og til tríggjar nýggjar ítróttarhallir til fimleikafeløgini í Havn.

---

Sisu á fremmandum hondum:

# Havnavatn riggar væl í Klaksvík

**Síðan Føroya Bjór fór at framleiða Sisu, fyrrverandi flaggskipið hjá Restorff, hevur sølan kring landið eydnast stak væl**

SODAVATN
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

- Tað hevur riggað stak væl. Sisu er eitt gott merki, sum vit eru fegnir um at hava fingið í okkara bryggjarí, sigur Heini Waag frá Føroya Bjór, sum sigur seg vera sera væl nøgdan við úrslitið higartil.

Føroya Bjór tók yvir frá kappingarneytanum Restorff, ið ikki helt seg til at bryggja Sisu longur, fyri góðum tveimum mánaðum síðani.

- Enn er so stutt fráliðið, og vit hava í veruleikanum bert selt Sisu við fullari megi í ein mánað, men tað hevur selt væl kring landið, sigur Heini Waag.

Tað er ein sannroynd, at Sisu altíð hevur selt mest í Havn, har drykkurin eisini varð bryggjaður áður. Men nú Føroya Bjór eigur merkið, er Sisu meira útbreitt kring landið.

- Vit eru spentir uppá gongdina. Sølan var dalandi, áðrenn vit tóku yvir, men vit hava satsað eitt sindur uppá Sisu, og vit gera nógv fyri at føra tað fram, sigur Heini Waag.

Føroyar Bjór fer eftir ætlan at framleiða onnur merkir, sum Restorff fyrr átti. Eitt nú liggur tað í kortunum, at peru-sodavatn skjótt verður framleitt.




*Sisu hjá Føroya Bjór selur væl, og bryggjaríið er væl nøgt við søluna higartil*

# Rennibreytin klár um hálvtannað ár

**Býráðið í Havn hevur prosjekterað og játtað pening til eina rennibreyt í Havn. Hon verður væntandi klár um hálvtannað ár**

RENNIBREYT
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur býráðið sett pening av til eina rennibreyt í høvuðsstaðnum, og higartil eru 5 milliónir tøkar til prosjektið.

Samlaða ætlanin kostar 18 milliónir, men býráðið hevur fyri fyrst sett 9 milliónir av til ætlanina. Breytin fer at liggja millum Shell-støðina á Hálsi og Termovirkið.

Talan er um eina rennibreyt við átta geirum, og eftir ætlan verður breytin klár at taka í nýtslu í oktober 2006.

# Keldan er also í Skálabotni

RÆTTING
*Stefan í Skorini*

Í samrøðu við Russ Taff í fríggjadagsblaðnum stóð skrivað, at konsertin fríggjakvøldið var í Kelduni í Skálavík. Um nakar ivast, so liggur Keldan also í Skálabotni í Eysturoynni og ikki í Skálavík á Sandoynni. So skuldi tað verið komið uppá pláss. Vónandi finna fólk fram til rætta stað hóast alt.